# Ítróttarfelag Fuglafjarðar




# ÍF - KÍ

HAVSBRÚN

LANDSKAPPING

Sunnudagin 7. september 2003

Kl. 15.00 í Fuglafirði

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

# ÍF - KÍ

**14. umfar í landskappingini hjá 2. deild monnum**
**7. september 2003**

## Leikskrá 7

**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Gunnvá Dam*
*Birgar Larsen*
*Janus Petersen*
*Steinbjørn í Lambanum*
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Rógvi Róin*

**Kápumynd:**
*Ein av trimum Petersen-beiggjunum á liðnum, Árni, í leysari luft undir venjing herfyri. Árni hevur í seinnu hálvu verið ein av teimum fjúrtan leikarunum, sum venjarin hevur havt við til dystirnar hjá 2. deild. Mynd: Rógvi Róin*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*



## ? STOVNIÐ
# EITT STUÐLAFELAG

Flestu av teimum størru feløgunum, sum hava lið í fyrstu deild, hava eitt stuðlafelag. Uppgávurnar hjá hesum stuðlafeløgunum eru rættuliga ymiskar, heilt frá at heppa á liðið til at tryggja og hjálpa til, at øktu leikligu og fíggjarligu krøvini til 1. deildarfótbólt verða uppfylt. Tað síðsta hevur m. a. við sær, at aðalnevndin í felagnum, sum so, m.a. ikki nýtist at hugsa um fíggjarligu viðurskiftini, sum føroyskur fótbóltur er meira og meira tengdur at seinnu árini.

Leikarar skifta føløg sum ongantíð áður. Hetta er, í hvussu er, ikki bert orsakað av fótbóltsligum ambitiónum. Nei, so bestemt ikki. Í rættuliga mongum førum eru pengar einasta orsøkin! Spell, men soleiðis er tað nú einaferð. Og skulu vit gera okkum galdandi í toppinum, sum vit sjálvsagt eiga, so mugu vit fylgja við. –At liggja í toppinum, er nakað, sum flestu tykkara ynskja, eingin ivi um tað. Tað er har tað "sker". Men samstundis hevur man mangan ilt við at skilja, at tað næstan bert eru pengarnir, sum avgerða, hvussu tað gongur á vøllinum.

Vísandi til greinina aðrastaðni í blaðnum, har heitt verður á nevndina, um at gera upp við seg sjálva, hvat hon vil, um tað skuldi hent, at vit flyta upp, eiga vit uttanfyristandand at hugsa tankan, at seta á stovn ein stuðlabólk. Hesin bólkur kann skúvast saman á ymsar mátar. –Um vit flyta upp, átti fyrsta uppgávan at verið, at hjálpt til fíggjarliga, tvs. at fingið pening til vega, soleiðis at karmarnir kring besta liðið eru nøktandi. Á hendan hátt hevði aðal- og fótbóltsnevndin samstundis meira orku at tikið sær av hinum liðunum og nevndunum í felagnum. Eitt annað, sum kundi verið ein "avleggari" av einum stuðlafelag, hevði helst verið eitt viðhaldsfelag. Uppgávan hjá hesum felagnum hevði í fyrstu atløgu verið einføld: at havt skipa viðurskifti fyri viðhaldsfólkini hjá felagnum, a la 12. maður.

Tað er sjálvsagt ikki uttan orsøk, at vit skriva hesar reglurnar í leikskránni í dag. –Vit halda, at økti áhugin kring liðið og felagið, góðu úrslitini, og øktu krøvini til arbeiðið í einum ítróttarfelag, hava við sær, at vit eiga at seta á stovn eitt stuðlafelag. Men eitt slíkt felag krevur, at sjálvboðin bygdafólk – um tað er viðhaldsfólk, fótbóltsáhuga ella ikki, tað er líkamikið – standa saman, og vilja arbeiða fyri sakini!

*Góða eydnu og góðan dyst!*





## GEVIÐ TOL -
# DYSTURIN ER 90 MINUTTIR




*Høgni hevur endiliga fingið møguleikan á besta liðnum, og seinasta vikuskiftið syrgdi hann fyri, at vit fingið ein javnleik í Vági, tá hann legði okkum á odda 0-1 í 1. hálvleiki. Hetta var samstundis fyrsta málið hjá honum í ár.*

Í dag vitja teir næstu-bestu úr Klaksvík, sum higartil hava havt eitt fínt kappingarár. Teir hava 19 stig, og liggja á einum 6. plássið, og eru framhaldandi við í kappingini um heiðursmerki. Teir hava eitt fínt lið, sum er samansett av fleiri ungum evnaríkum leikarum, nevnast kunnu m.a. David Bertholsen, Kristian á Lakjuni og Erling Flest. Teir báðir síðstnevndu eru nokk ikki við í dag. -Kristian er burturstaddur, meðan Erling varð leikbannaður 5 umfør, eftir at hava lagt eftir dómararunum í dystiu herfyri. Umframt ungu leikararnar eru onkrir eldri leikarar við drúgvum royndum á liðnum. Kendasti – í hvussu er fyri okkum – er helst leikandi venjarin Olgar Danielsen.

Hyggja vit eitt sindur nærri at hagtølunum til dystin í dag, so er úrslitini hjá gestunum ógvuliga svingandi. –Teprir sigrar og fleiri stórtap. Hinvegin eru onkur hagtøl, sum ikki eru okkum til vildar: teir hava vunnið á øllum uppflytingarkandidatunum í ár, nevnliga Sumba, TB og AB – tó ikki okkum.

Hagtøl eru eitt, innsatsurin á vøllinum eitt annað. Samstundis sum KÍ-liðið er nakað skert til dystin í dag, eru vit eisini eitt sindur skerdir, sjálvt um vit helst hava breiðari hóp enn teir, og harvið fleiri leikarar í góðari venjingarstøðu at taka av. -John fekk skaða í dystinum á Sandi herfyri, og er framvegis ikki klárur. Roy, sum hevur fingið nógva spælitíð í seinnu hálvu, er burturstaddur, og er tí heldur ikki við í dag. Hinvegin er Áki, sum ikki var við í Vági klárur aftur, og kemur tí helst í miðverjuna aftur, har Árni hevur røkt plássið fyrimyndarliga. Ein annar møguleiki, er at flyta Áka fram á sentrala miðvøllin, nú tveir av vanligu miðvallarunum, John og Roy, ikki eru tøkir. Høgni á Lakjuni, sum fram til summarsteðgin ikki hevði leikt nógv á besta liðnum, hevur seinastu umførini veruliga fingið kjansin, og hann kann eisini sigast at hava tikið hann. Hann skoraði í 1-1 javnleikinum í Vági síðsta vikuskiftið. Um hann byrjar inni í dag er ilt at siga, men tað velst helst um, hvussu venjarin skipar miðvøllin. Men helst byrjar Høgni í álopinum saman við Hanusi. So verður Ken í vinstru og Eyðolvur í høgru. Verjan verður tann sama.

Tað er týdningarmikið at okkara leikarar ikki undirmeta klaksvíkingarnar, líkamikið hvussu teirra lið er mannað í dag. Vit skulu heldur binda um heilan fingur, og tí fyrst og fremst ikki leypa framav, og lata teir skora. Dysturin er 90 minuttir, og hjá okkum ræður tað um at fáa øll stigini; á hvønn hátt er líkamikið!

RÒGVI RÒIN SKRIVAR:

# 1. DEILDARFÓTBÓLTUR OG HVAT SO?



*Skógvarnir síggja góðir út, og eru tað helst, men tað krevur nógv gott fólk, um vit skulu gera okkum vónir um at klára okkum í bestu deildini.*

"Man skal ikki selja skinni fyrrenn bjørnin er skotin", sigur orðatakið. Men tað er eingin loyna, at sum støðan er áðrenn dystin í dag, og hon hevur verið seinastu mongu umførini, so hava okkara menn beina kós móti 1. deild. Tó hava vit ikki selt skinnið enn, men eg haldi, at vit (tá meini eg við nevndina, viðhaldsfólkini, stuðlar o.o. sum standa liðnum og felagnum nær) longu nú – um ikki fyri langari tíð síðani – áttu at farið at hugsa um, ***hvat nú*** um vit flyta upp í 1. deild í ár. Vit hava eitt gott lið í ár, við nógvum evnaríkum leikarum, sum persónliga høvdu klára seg væl í bestu deildini, tað er eingin ivi um tað. Men vit mugu staðfesta, at tað skal meira til, um vit, sum lið, skulu gera okkum nakrar vónir, um at klára okkum í deildini omanfyri. Hetta er bert ein ásannan, og um tit vilja hava eina staðfesting, kann eg bert vísa á seinastu umførini, har vit ikki hava víst fótbóltspæl, sum er nóg gott at vera millum teir bestu. Sorry!

**Venjaraspurningurin**

Um vit skulu byrja við venjaranum ella leikarunum er líkamikið. -Sigfríður, sum er venjari hjá besta liðnum í dag, hevur í ár víst, at hann er ein ein venjari, sum – um hann hevur ambitiónir til tað – røkkur langt, og vit koma at síggja nógv til í føroyskum fótbólti í framtíðini. Tí haldi eg, at nevndin eigur at taka eitt prát við hann, um hvørjar ætlanir hann hevur komandi ár, líkamikið um vit flyta upp ella ikki. Umframt at venja fyrstu deild, haldi eg, at nevndin átti at givið honum aðrar uppgávur í felagnum. Eitt nú hevur hann fingist nógv við yngru liðini hjá teimum báðum havnafeløgunum, sum hann hevur leikt fyri, meðan beinini vildu tað, og tað dugir hann eisini væl. Honum nýtist ikki at venja hesi, men kann vera eitt slag av ráðgevara hjá venjarunum og møguliga venja eitt ella tvey lið, umframt besta liðið. Hetta er sjálvsagt eisini ein spurningur um pengar, men eg eri sannførdur um, at hesin peningurin er væl givin. Men hetta krevur so aftur, at felagið setur sær framtíðarmál við fótbóltinum – ikki bert besta liðnum, men eisini teimum ungu, sum hava nógv størri tørv á rættari vegleiðing í fótbólts-uppalingini (um nakað eitur so), enn teir vaksnu hava; "tað er jú verri at læra gamlan hund....."

**Leikararnir**

Ikki minni týdningarmikið er til komandi ár at tryggja sær, at allir leikararnir, sum hava myndað liðið í ár, halda fram. Hetta er eingin sjálvfylgja longur, og so

*(framhald á bls. 26)*



## TÚ

**Navn:** Martin Hansen
**Føðingardagur:** 19.05.1980
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** á Vònini
**Pláss á vøllinum:** høgri bakkur ella høgri miðvøllur
**Hædd og vekt:** 186 cm. og 75 kg.
**Yvirtrúgv:** onga
**3 orð sum lýsa teg:** tall, dark and handsom
**Torførast mótstøðumaður:** Viggo
**Frítíðarítriv:** billiard og borðtennis (bíði til Jan bjóðar av)
**Vónir fyri 2003:** vinna 2. deild

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** í ár móti VB í Vági
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** 1986
**Aðrar ítróttargreinar:** billiard
**Minnigarríkasti dystur:** sigurin ímóti B36 í finaluni í smádreingjum
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** veit ikki, møguliga Eilif
**Besti fótbóltsleikari:** Zinedine Zidane
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** borðtennis, kanska
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** venjing við bólti
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** upphiting tá ið Ken skipar fyri
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Howard - Ayala, Nesta, Ferdnand, Carlos - Giggs, Zidane, Keanem Beckham - Nistelrooy, Henry



## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** burgari frá Bryngerð og Cola sunkist
**Slag av tónleiki:** 80´ara rokk
**Sjónvarpssending:** 3-2
**At slappa av:** sova ella ein film
**Troyggja nr.:** nr. 7
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Zidane
**Sjónvarp/filmstjørna:** Edvard Norton
**Besta bók/blað:** Ð


O·N·L·Y
VERO MODA

>> vælkomin í KATO
Fuglafjørður



Fysioterapiviðgerðarstova

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur

**Lastvognskoyring**




**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**
530 Fuglafjørður
tel. 444 245 ella 217 245

**Føroya Shell**

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |






HYDRAULIK
RÁÐGEVING
VERKÆTLANIR
ÍSETANIR
UMVÆLINGAR
MASKINUMVÆLINGAR
SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING



**Sølu-og tænastuumboð fyri:**

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og línuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brenniolju og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (idnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

**Á goymslu:**

Hydr, slangur og fittings, hydr, rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúluleigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.

**KJ-HYDRAULIK**

P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com



**Salong Yndi**
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490




FØROYA BANKI




Bílegging av pizza



www.pizza.fo

Team 85 358000

P.O. Box 97
FO-110 Tórshavn
Tel +298 350 000
Fax +298 350 001
hotel@hotel.fo
www.hotel.fo

*Hotel Tórshavn er hotellið í miðbýnum. Hotel Tórshavn virkar bæði sum hotel og sum sjómansheim. Á hotellinum eru allir hentleikar - frá gisting til skeiðsvirksemi og frá léttum kosti til fínan kost. Hotellið hevur 41 seingjarpláss. 20 starvsfólk arbeiða á hotellinum.*




FONN FLOG

FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo






**VØRDSLAN**
WEARHOUSE
I Stað • 530 Fuglafjørður • Tel. 444 747




**TOYSTOVAN** tel. 444637/444075 530 Fuglafjørður

# SV - TRANSPORT

**Allur flutningur við:**

**Lastbilum | Kranabilum | Trailarum**

**Dumparum | Bingjubilum**

**530 Fuglafjørður** **tel. 44 41 77**





**Tilfar til umvælingar, ábøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
**tel. 444 126**






**Fiskamjøl**



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

**Fiskalýsi**



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

**Fiskafóður**



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

**Uppisjóvarfiskur**



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**
Havsbrún Ltd. · 530 Fuglafjørður
tel. 444 100 · fax 444 160
havsbrun@havsbrun.fo
www.havsbrun.fo



## Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:

- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jørmund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)

☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo





CLIMACOOL RESPW
800⁰⁰



REKORD
700⁰⁰



A CUB.TWIN STRI
1.400⁰⁰



SUPERSTAR II
700⁰⁰

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR á Glyvrum - Glyvravegur - Glyvrar - tel.44 73 99 - fax 44 73 97





# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak



býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**



býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**fuglafjarðar kommuna**
tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo

**Fuglafjarðar Keypsamtøka**

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895

**Alfa Seafood Sp/f**

Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tel. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 • E-mail: alfa@post.olivant.fo



Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

**Profa Farvur**

Profa

v/Petur Gaardlykke • 600 Saltangará • tel. 44 91 49

**FAROE SEAFOOD**

Fiskavirkið í Fuglafirði • Postboks 53 • tel. 444 500 • faks 444 580

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar takkar øllum lýsarum fyri dyggan stuðul.

Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Postboks 94 - 530 Fuglafjørður - tel./fax 444 636




Lamineraðir frontrútar til øll bilmerkir



# FLÜGGER

- Dygdarmáling til lágan prís
- Lyklar, innramming, gólvtilfar og fiskireiðskap til smábátin

*Tasjan á Bugnum*
530 Fuglafjørður
tel. 44 50 44
fartel.: 22 11 09

# BAADER®

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

**P/F Petur Larsen**






*Reiðari innan frakt- & sandbátar*
*Krana- og lastvognskoyring*
*Sandsøla*

SANDGREVSTUR
Stovnað 1949
530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921




B S
P/F BOÐASTEINUR
Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 444800
Fax +298 444840
E-mail: alibo@post.olivant.fo




HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA


HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA

| | |
|---|---|
| UNDIRVATNSLJÓS | EL-MOTORAR |
| UNDIRVATNSKAMERA | EL-LUTIR |
| TRÁÐLEYST VIDEO SAMSKIFTI | FREKVENS UMFORMARAR |
| ALARMSKIPANIR | EL-TALVUR |
| PLC-STÝRINGAR | FYLGISVEINASJÓNVARP TIL SKIP |

JT electric
JT electric Ltd. Kambsdalur Faroe Islands Tel +298 474444 Fax +298 474445 jtelectric.com

*Blómuhandilin*

## *Orkis*

*625 Glyvrar*

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

***tel 44 82 89***
***fax 44 89 89***

## Danny Transport

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**

Landsins **størsta** og **besta** úrval av ítróttarheiðursgávum

**Steyp**
**Heiðursmerki**
**Heiðursbrøv**
**Toy við búmerki**
**Streamers**
**Klistrimerki**
**Seruppgávur við gravering**

Vit seta **títt** búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað

FA. **EILIF ARGE**
**KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK**
**TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76**



## Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358






**Nissan Micra**

Tann nýggi Nissan Micra er ætlaður at skapa gleði millum fólk.

Tann nýggi Nissan Micra hevur til dømis minsta vendiradius í sínum flokki. Nýggi Micra hevur eisini mest framkomnu lásiskipan hugsast kann. Og tá ið tú setir bilin frá tær, lýsir hann tær heim. Vitjið hjá Nissan við Oyggjarvegin ella vitjið heimasíðuna www.nissan.fo



Nissan Micra

**P/F Meinhardt Arge**

við Oyggjarvegin
Tórshavn
tel. 345400 • fax 345401

## Bussar til øll endamál



Serflutningur til rørslutarnaði
Bólkaferðir, bæði innan- og uttanlands
Ítróttarferðir, bæði innan- og uttanlands
Skúlabarnakoyring
Bygdaleiðir
Bussar frá 7 til 56persónar

Spf. AP Andreas Poulsen BUSSKOYRING
✆ 22 52 20 - 44 17 20
FO-513 Syðrugøta • e-mail:pouand@post.olivant.fo

## Heimavirkis søla og framsýning

Piddasa handil

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

Gallari Ribarhús

Opið er:
mán.-fr: 15.00-17.30
leyg.: 11.00-13.00

Tel. 444 427

GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71

## Altíð nýbakað breyð

Sunnumorgnar fæst breyð á hesum støðum:
Statoil í Leirvík
Hjá Halluri í Gøtu
Statoil í Skálabotni
Statoil í Saltangará
Kiosk Vár í Saltangará
Statoil á Strondum

Handilin er opin soleiðis:
Má-Ley: 07.00-17.30
Sun: 08.30-10.30

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 388



ÚB

## Úrvalsbilar Spf.

- Søla av brúktum innfluttum bilum
- Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

• www.bilar.fo

Bakkavegur • 530 Fuglafjørður • tel. 444 943 • fax 444 638 • Fartel. 281943

HeimaGreiðslan




Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

LANDSKAPPINGIN:

## KAPPING Í TOPPINUM!

# AVGERÐIN FELLUR UM STUTTA TÍÐ!

Nú harðnar kappingin um fyrsta plássið í deildini og harvið beinleiðis uppflyting í bestu deildina. Til fyri fáum umførum síðani vóru við einaráðandi í toppinum, meðan trý ella fýra lið kappaðust um annað plássið, væl niðanfyri okkum. Hesi vóru fyrst og fremst Sumba, TB og AB, sum samstundis eru einastu liðini, sum hava møguleika at flyta upp; hini hava øll lið í 1. deild. Annars hava gestirnir í dag, KÍ og mótstøðuliðið hjá okkum síðsta vikuskiftið, VB, eisini blandað seg í kappingina um heiðursmerkini.

Nú bert fimm umfør eru eftir av landskappingini eru tað so at siga bert tvey lið, sum kappast um fremsta plássið. Tað eru vit og tvørámenn, sum veruliga hava fingið vind í seglini. Síðani summarsteðgin hava teir ikki tapt nakran dyst. - Teir hava fingið 13 av 15 møguligum stigum; bert í 1-1 javnleikinum í Sumba settu teir stig til. Seinasta liðið, sum vann á TB var mótsøðulið okkara í dag. Teir vunnu 2-1 í Klaksvík í seinasta umfarinum áðrenn steðgin. Meðan TB hevur fingið 13 stig seinastu fimm umførini hava vit bert fingið 8, og tí liggja teir, áðrenn dystirnar í dag, bert 4 stig aftanfyri okkum. Og komandi vikuskiftið skulu vit netupp til Tvøroyri at leika ímóti okkara harðastu kappingarneyta, og tann dysturin verður helst avgerðandi.

Úrslitini í dag hava sjálvsagt týdning fyri spenningin í kappingini. Tvørámenn leika ímóti B36 í Havn, sum bert hevur tapt ein av teimum fimm seinastu dystunum. Vit vænta, at TB fær tað torført í Havn í dag, og helst kemur at missa stig ímóti einum uppsettum B36-liðið, sum framvegis hevur møguleika til heiðursmerki. Vit fáa tað eisini torført í dag, men vit eiga at vinna. Hyggja vit at dystunum ímóti KÍ í Fuglafirði seinnu árini, er okkara ráð til leikararnar: ikki undirmeta liðið og DEKKIÐ Olgar Danielsen, um hann er á vøllinum. Hann hevur avgjørt mangan dystirn til teirra fyrimun!

Út frá omanfyrinevnda og hagtølum fyri árini frammmanundan halda vit, at ein avgerð fellur í landskappingini komandi vikuskiftið, tá toppdystur er á Sevmýri. Lat okkum vóna at tað verður til okkara fyrimun....


## Stuðlið ÍF

## Keypið lutaseðlar til heimadystirnar

**Til teir seinastu tríggjar heimadystirnar hjá 2. deild er møguleiki at keypa lutaseðlar. Drigið verður um 3 vinningar til hvønn dyst. Til tann seinasta dystin móti Sumba leygardagin 4. oktober verður eisini drigið millum allar seldar seðlar um eitt gávukort á 1.000,- frá P/F Haraldsen. Lutaseðlarnir kosta kr. 5,- fyri hvønn, og verða seldir í sølubúðini í ovaru hæddini, samstundis sum Helena fer at selja kring vøllin.**

**Minnist til: goymið seðlarnar!!**




HUGSKOT:

# NÝGGI VØLLURIN-KREVUR SÍN MANN...

Fyri góðum trimum viku síðani varð nýggja graslíki lagt á, og vøllurin tikin í brúk. Sigurð S. Simonsen, borgarstjóri, skrivaði í seinastu leikskránni nøkur orð um nýggja vøllin og hugleiddi eitt sindur um søguna hjá fótbóltsvøllinum í bygdini. Hann vísti m.a. á, at nýggja graslíki kosta kommununi uml. 2. mió. krónur at leggja á. Hetta er ikki smápengar, og við slíkari vælvild frá kommununi hevði vøllurin neyvan verið skiftur. Takk fyri tað!

Tá ið kommunan er so beinasom at tryggja felagnum slíkar karmar at leika bólt undir, so er tað upp á sítt pláss, at vit fuglfirðingar syrgja fyri, at slíkir karmar verða varðveittir og enntá betraðir. Tað er einki ivamál, at vøllurin helst er besta spæliplássið í bygdini – um ikki í øllum landinum – og hann viðkemur øllum fuglfirðingum. –Tað er nokk eingin í bygdini, sum ikki hevur tilknýti til vøllin á ein ella annan hátt.

Tað er komið okkum á leikskránni fyri oyra, at ávísir persónar tosa um, at veita eina hjálpandi hond, soleiðis at vit framhaldandi kunna varðveita og møguliga eisini bøta um hesar karmar. Men enn eru hesir ikki so nógvir, og tí kundu teir hugsa sær, um tað ikki vóru fleiri av tykkum, sum hvørt vikuskiftið standa á bakkanum og heppa – og til tíðir harta – okkara leikarar, sum høvdu áhuga at tikið ein hond í, soleiðis at vøllurin altíð var innbjóðandi og væl røktur. Og, sum teir siga, tess fleiri vit eru, tess lættari gerst arbeiðið.

Vit halda hugskotið vera frálíkt, og mæla til, at hesin "hjálparfelagsskapur" verður settur á stovn. Um undirtøkan verður góð, kann hann kanska eisini virka sum eitt slag av "undirhúsið", har mannfólkini savnast í ítróttarhúsinum til ein kaffimunn og eitt sindur av reypi eftir lokið arbeið. Góða eydnu við tiltakinum!

## 1. DEILDARFÓTBÓLTUR OG HVAT SO:

*(framhald av bls. 4)*

slettis ikki fyri fleiri av okkara leikarum, sum uttan iva eru í kikaranum hjá fleiri av liðunum í bestu deildini, tí teir hava evnini. Umframt hetta, mugu vit eisini fáa fatur á leikarum, sum hava royndir frá fótbólti á hægri støðið. Tí fari eg eisini at heita á nevndirnar og tey fólk, sum hava ábyrgd av hesum, um at seta seg í samband við møguligar leikarar til komandi ár, um tað er tað, man vil. Um ikki, so greið leikarum, venjarum og viðhaldsfólkunum frá tykkara ætlanum.

Um tit nú velja at fara aðrastaðni eftir leikarum at styrkja liðið, so skal hetta gerast við umhugsni. Einki ivamál er, at tit skulu ráðføra tykkum við komandi venjaran hjá liðnum. Hann hevur jú dagligu umsitingina av liðnum og leikarunum, og veit, hvar brúk er fyri leikarum, sum vilja styrkja liðið til eina møguliga kapping í bestu deildini.

So mín áheitan á nevndina er fyrst og fremst at taka eitt seriøst prát við Sigfríð, ongantíð ov skjótt; spurningurin til hann kann vera: "hvørjar ætlanir hevur tú komandi ár?".....

Samstundis kunnu tit tosa við leikararnar á liðnum – ein og ein, ella samlaðar – og greiða teimum frá, hsussu týdningarmikið tað er, at teir halda fram, og harvið tryggja, at vit kunnu byggja víðari á tað, sum Sigfríður hevur lagt í beinini í ár. Um møguligt eiga til at eisini at tryggja tykkum, at allir leikararnir halda fram, umframt at ungu og evnaríku leikararnir, sum enn ikki hava fingið møguleikan á besta liðnum, ikki fara aðrastaðni at leika. Nú er bólturin spældur víðari; vóni at tit spæla hann skilagott frá tykkum......

KAPPING

# ÁRSINS ÍF´ARI 2003

## SPENNANDI KAPPING - JOHN BESTUR SEINAST



Í dystinum ímóti B36 fyri trimum vikum síðani gjørdist John fyri fyrstu ferð í ár dagsins leikari. Fyri tað fær hann ein ein døgurða-bita fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku. Nú bert trý umfør eru eftir av kappingini er ógvuliga spennandi í toppinum, har Áki er fremstur við 328 atkvøðum.

***Leggið til merkis!!*** Tað eru bert áskoðarar til dagsins dyst, sum kunnu atkvøða, og tað er **ein** atkvøðuseðil pr. áskoðara. Er tað onkur sum letur fleiri atkvøðuseðlar inn, verður bert tann eini tikin við.

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttar-húsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

**Atkvøðutal**

| | ÍF-B36 | Íalt |
|---|---|---|
| John Thomsen | 97 | 270 |
| Áki Petersen | 81 | 328 |
| Hanus Eliasen | 50 | 301 |
| Sverri Ellingsgaard | 50 | 225 |
| Rúni Petersen | 40 | 43 |
| Roy Róin | 16 | 19 |
| Viggo Johannesen | 16 | 67 |
| Eyðolvur R.-Petersen | 13 | 146 |

### VINNINGAR

- Ársins ÍF´ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.

Restaurant Muntra

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

HARALDSEN
- títt keyp -

## Atkvøðuseðil

ÍF - KÍ, 7. september 2003

Dystur: ____________

Nr. 1 (5 stig): ____________ Leikari

Nr. 2 (3 stig): ____________ Leikari

Nr. 3 (2 stig): ____________ Leikari

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ____________ Tel.: ____________





# SØLUBÚÐ Í OVARU HÆDDINI Í ÍTRÓTTARHÚSINUM

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. Liðnum, eru aftur í ár til dystin fús. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til beint eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF´ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

Sjálvt um hølisviðurskiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisni í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjarin fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin.



## ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

Vinnarin seinastu ferð gjørdist Ørvar Jacobsen. Hann vann í lutakasti við Paula Mohr. Tey høvdu bæði 8 røtt av 13 møguligum. Fyri at vera besti tipparin fær Ørvar ein sodavatns kassa frá Føroya Bjór. Tillukku við tí.

Hann sleppur somuleiðis út at bowla við 1. liðshópinum seinni í heyst, og so er hann eisini við í lutakastinum um Apex-flogferðaseðilin frá Atlantic Airways.

Røttu svarini til teir 13 spurningarnar seinast eru:

| ÍF TIPS 13 - Spurningar og svar - 6. Umfar: | Tekn: | Svar: |
|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur venjarin hjá KÍ? | X | *Jan Joensen* |
| 2. Hvussu eitur nýggi [illegible] liðfelagin hjá Toda Jónsson og FCK? | 2 | *Alvaro Santos* |
| 3. Nær er NSÍ stovnað? | X | *1957* |
| 4. Hvussu nógvar [illegible] hevur Trúgvi Nesá? | 2 | *Tvær* |
| 5. Hvussu eitur heimavøllurin hjá VFB Stuttgart? | X | *Gottlieb-Daimler stadion* |
| 6. Hvar er Bora Milutinovic venjari? | 1 | *Honduras* |
| 7. Hvørjum felag hevur Bjarne Goldbæk *IKKI* leikt fyri? | 1 | *Hamburger SV* |
| 8. Á hvørjum landsliði leikar Marek Jankolovski? | 1 | *Kekkia* |
| 9. Úr hvørjum felagi keypti Inter Christian Vieri? | 2 | *Atletico Madrid* |
| 10. Frísparkið! [illegible] verður gjørt ímóti Jonn beint uttanfyri brotsteigin hjá B36. Dómarin bríkslar fyri óbeinleiðis frísparkið. Tá Høgni Z. skal taka frísparkið, gloymir dómarin at koyra hondina í loftið, fyri at vísa at frísparkið er óbeinleiðis, og Høgni [illegible] beinleiðis uppá frísparkið... Hvat ger dómarin? | X | *Málspark* |
| 11. Hvar var HM í 1970? | 1 | *Meksiko* |
| 12. Hvør vann Europa Cup fyri meistarar í 1975/76? | 1 | *Bayern Munchen* |
| 13. Hvussu nógv mál hevur Gabriel Batistuta skotið í sínum 293 dystum fyri italsk lið? | 2 | *182 mál* |

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

***Aðalnevndin:***
Formaður
Rúni Petersen, tel. 215887
2. formaður
Høgni á Lakjuni tel. 444418
Peningarøkil:
Linda Joensen, tel. 445132
Skrivari:
Hildigarð Eliasen, tel. 444052/228771

***Fótbóltsdeild:***
Hildigarð Eliasen tel. 444052
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Ólavur Larsen, tel. 224659
Mortan Nónsgjógv
Atli Petersen, 444 018

***Venjarar:***
***2. deild:***
Sigfríður Clementsen, tel. 31 76 59
***3. deild:***
Báðrur Mortensen, tel.
***4. deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***Old Boys:***
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Birgar Larsen, tel. 22 10 37
***Dreingir Ø.:***
Janus Petersen, tel. 26 43 99
***Smádreingir Ø.:***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Smádreingir 1/2 vøllur***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Piltar 1/2 v a-b.:***
Hanus Eliasen, tel. 22 17 52
***Smápiltar:***
Atli Petersen, tel. 26 82 95
***Gentur:***
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
***Smágentur:***

***G.10-12 ár:***
Jónfríð Joensen, tel. 254170
***Yngst:***
Hanna Poulsen

# ÍF  KÍ

1. Fróði Poulsen
2. Áki Petersen
3. Jan Skoradal
4. Viggo Johannesen
5. Heini Heinason
6. Fritleif í Lambanum
7. Martin Hansen
8. Sverri Ellingsgaard
9. Rúni Petersen
10. Hanus Eliasen
11. Eyðolvur R. Petersen (liðsk.)
12. Árni Petersen
13. Høgni á Lakjuni
14. Ken Bærentsen
15. Eyðun Ryggshamar
16. Jákup Helgi Egholm
17. Høgni Zachariassen
18. Atli Petersen
19. Roy Róin
20. John S. Thomsen

Venjari: Sigfríður Clementsen
Hj.venjari:
Liðleiðarar: Trúgvi Nesá
Tórstein Joensen

Venjari: Olgar Danielsen
Hj.venjari:
Liðleiðari:

## Dómarabólkur:

Dómari: Rúni Gaardbo, B68
Hjálpardómarar úr B68

## Bóltsponsorur:

Petur Abrahamsen